## Avgustur rak á land

Tá menn nú um dagarnar vóru á fjalli við Kaldbaksvík í Íslandi, gingu nakrir teirra fram við sjónum. Umframt seyð komu menninir fram á mangt og hvat, sum var rikið upp á land í summar, men tað mest merkisverda, sum teir funnu, vóru leivdirnar av einum hvali. Hvalurin, ein avgustur, var umleið 14 metrar langur. Men sum myndin hjá einum av fjallmonnunum vísir, hevur hvalurin ligið leingi í fjøruni, og har varð hann liggjandi, skrivar Morgunblaðið.



## Kanna veðurlags-broytingar

Danska veðurstovan DMI og Roskilde Universitetscenter fara nú undir eina verkætlan, sum hevur til endamáls at kanna veðurlagsbroytingarnar í Suðurgrønlandi, og hvussu tær ávirka viðurskiftini hjá fólki har, skrivar blaðið Sermitsiaq. DMI hevur skrásett ísviðurskiftini í Suðurgrønlandi síðani 1950, og nú ætlar stovnurin at spyrja fólk har, hvussu ísbroytingarnar hesi 57 árini hava ávirkað teirra gerandisdag, skrivar Sermitsiaq.

# Per á kunningarferð

**Danski uttanríkis-málaráðharrin, Per Stig Møller, hevur verið í Føroyum á árliga kunningarfundinum. – Vit eru samdir um næstan alt, sigur hann**

KUNNINGARFERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Per Stig Møller gjørdi ein lítlan »avstikkara« í morgun, áðrenn fundin við uttanlandsnevndina hjá løgtinginum. Hann nýtti høvið at hyggja nærri eftir Heinesens Húsi.

Danski uttanríkismálaráðharrin hevur í tveir dagar vitjað í Føroyum á árliga kunningarfundinum, har hann kunnar løgmann og uttanríkisnevndina um viðurskifti í altjóða høpi. Fram móti miðdegi í dag hildu Per Stig Møller og løgmaður tíðindafund úti í Tinganesi.

Og at døma út frá tónanum á fundinum, er alt tann reini idyllur landanna millum.

Í gjár var fundur millum løgmann og danska uttanríkismálaráðharran, og har vóru sambært løgmanni fleiri mál umrødd. Eitt nú støðan Føroyar-ES og okkara leiklutur á ES-økinum, serliga við atliti til útbúgving og flogferðslu.



*Per Stig Møller gjørdi ein avstikkara í morgun at hyggja nærri at Heinesens Húsi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eitt annað mál var ynski um føroyskan EFTA limaskap, nakað, ið varð gjølla umrøtt á tíðindafundinum. Løgmaður greiddi frá, at tað fyri tað mesta er Sveits, sum liggur í buktini, tí bæði Noregi og serliga Ísland hava talað fyri føroyskum limaskapi. Liktenstein hevur hug at halla tann vegin Sveits hellur, so takið verður at sannføra sveitsarar um tað skilagóða í føroyskum limaskapi.

### Gott samstarv

Men eisini Fámjinskjalið, radarin á Sornfelli og verjupolitikkurin í Norðuratlantshavi sum heild vóru uppi at venda. Sama vóru uttanríkispolitiska heimildarlógin og atlimaskapurin í FAO vórðu umrødd.

Per Stig Møller var fámæltari enn løgmaður, men vissaði um, at londini bæði høvdu eitt framúr gott samstarv. Alt varð latið upp í hendurnar á føroyingum, og danir stóðu klárir at hjálpa uttan mun til, hvat vit annars máttu tikið støðu til at gjørt.

Spurdur, um hann vildi mæla til føroyskan ES-limaskap segði danski uttanríkismálaráðharrin, at tað var ikki hansara borð.

Eg skal fegin bjóða føroyingum upp í ES, men tað verður upp til teir sjálvar at taka støðu til. Og teir hava valt heldur at sleppa upp í EFTA, og so hjálpa vit við tí eftir førimuni, segði Per Stig Møller.

Hann undirstrikaði, at tað í løtuni eingin ósemja valdar millum føroysku og donsku stjórnina. Og hesum kundi løgmaður bert taka undir við.

# Tað verða trupulleikar

**Evald Kjølbro frá Landsverk er ikki eins bjartskygdur um flogvøll í Nólsoy, sum aðrir. Hann sær stórar trupulleikar fyri sær**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Longu dagin eftir, at Bjarni Djurholm hevði fingið handað uppskotið hjá Magnus Hansen, lat hann tað víðari til Landsverk at gera nærri metingar og kanningar.

Serfrøðingurin innan økið hjá Landsverk, Evald Kjølbro, sigur, at hann sær stórar trupulleikar við lendisviðurskiftunum, men hann vil kortini ikki í løtuni siga, at oyggin kann avskrivast sum flogvallarøki.

- Vit viðgera málið í løtuni og seinni í vikuni kunnu vit siga nærri, um økið á Borðuni í Nólsoy er egnað ella ikki. Men vit vita longu nú, at tað eru lendistrupulleikar bæði norðarfyri og sunnanfyri ætlaða vøllin, sigur Evald Kjølbro.

Hann sigur, at tað finnast altjóða reglur fyri millum annað lendisviðurskifti, og hesi skapa trupulleikar við innflúgving yvir Havnini.

- Lendið er ov bratt. Tað krevst eitt ávíst frílendi við síðuna av vøllinum, og tað verður ein trupulleiki norðantil. Og eisini sunnanfyri eru trupulleikar, tí tað gerst of bratt útav, sigur Evald Kjølbro

Men hann vil sum nevnt ikki siga nakað avgerandi, fyrr enn teir eru lidnir at gera teirra metingar, og tað verður seinni í vikuni.



*Evald Kjølbro er serfrøðingurin innan flogvallir hjá Landsverk. Her frá framløguni av útbyggingarætlanunum í Vágum og uppskotum um alternativan flogvøll*

*Mynd: Jens Kristian Vang*